Strategi fyri lántøku landskassans

Landsins lántøka skal vera til marknaðarkor

Lánbrøvini, sum vera útgivin, vera skrásett á keypsskála bæði í Íslandi og í Keypmannahavn.

Fleiri ymisk atlit vera tikin, tá landið tekur lán, millum annað at:

- Fíggjarkostnaðurin eigur at vera minst møguligur
- At miðja eftir at skuldin er langfreistað, so landskassin ikki skal endurfíggjað ov stóran part av skuldini í einum, og harvið átaka sær ov stóran endurfíggingarváða.
- Miðað verður ímóti at útgávurnar eru í minsta lagi 1 mia. kr. í hvørjari lánsbrævarøð fyri at minka um gjaldførispremiuna. Eisini verður roynt at taka lánini í stórum upphæddum hvørja ferð, tí fleiri keyparar eru ikki áhugaðir, um tillutaðu upphæddirnar eru ov smáar.
- Miða ímóti at vera á marknaðinum í minsta lagi á annað hvørt ár, fyri javnan at verða á marknaðinum, og harvið hava samband við íleggjarar.
- Fíggjaramboð kunnu nýtast, um tað minkar um váðan og fíggjarkostnaðin. Tó verður tað lagt fyri landsbankanevndina í hvørjum einstøkum føri.